

# Boða frá arbeiðssteðgi

*Í gjár fór Føroya Lærarafelag aftur til samráðingar við Fíggjarmálastýrið. Felagið boðar nú frá arbeiðssteðgi, um semja ikki fæst innan 1. mars*

Dagfinn Olsen

Føroya Lærararfelag og lønardeildin hjá Fíggjarmálastýrinum hava havt nakrar samráðingarfundir. M.a. hava partarnir lagt fram síni ynski og tosað hevur verið um arbeiðstíðina.

*Føroya Lærarafelag á veg til samráðingar fyrrapartin í gjár*
**Myndir: Jens Kristian Vang**

Í gjár fóru partarnir aftur til samráðingarborðið. Føroya Lærarafelag hevur í farnu viku havt fund við ymsu limabólkarnar, t.d. skúlaleiðarar og álitisfólk.

Felagið fær dyggan stuðul frá øllum limunum, sum heita á felagið um at halda fast við krøvini mótvegis Fíggjarmálastýrinum.

Millum hjartamálini hjá Føroya Lærarafelag er t.d. arbeiðstíð og lønarkrøv. Krøvini eru á leið tey somu, sum at byrja við.

Til samráðingarnar í heyst funnu partarnir fram til eina fyribils semju, sum fer úr gildi 1. mars 2000. Føroya Lærarafelag hótti eisini tá við arbeiðssteðgi. Felagið kann nú nýta verkfallsrættin, tí lærarar eru ikki settir tænastumenn longur. Tó eru nakrir av eldru lærarunum tænastumenn, meðan tey, ið eru komin til seinnu árini ikki eru tað og tí hava verkfalsrætt. Soleiðis kann talan verða um fyrsta arbeiðssteðg í søgu Føroya Lærarafelags, um semja ikki fæst innan 1. mars 2000.

# Illveðrið ringast í Gøtu

*Illveðrið leygardagin gjørdi ikki so nógv um seg í Havn, men í Eysturoynni fekk løgreglan nógvar fráboðanir um stormskaðar*

Dagfinn Olsen

Sera nógvur vindur var leygardagin og klokkan 13:10 tann 29/01 - 2000, sendi politistøðin í Havn út fráboðan um óvanliga nógvan vind. Heitt varð á fólk um ikki at koyra í økinum Gøtugjógv - Fuglafjørður, um hetta ikki var strangliga neyðugt.

Og tað var sertakliga í Eysturoynni, at fráboðanir komu um stormskaðar.

Ein bingja á Sevdalsvegi í Fuglafirði varð tikin av vindinum. Við Gøtugjógv fóru hurðarnar í Losjuni av vindi. Eisini fór ein vindskeið á einum eldri húsnum eins og vindeygu í gomlum húsum.

Í Norðagøtu fóru fleiri vindeygu. Ein skúrur fór í vindinum og 20 tonsarin Anna Maria sleit, men ein endi helt og fór báturin tí ikki so langt. Eisini fór eitt hoyggjhús og eitt gróthús í vindinum.

Í Syðrugøtu var ein skúrur um at fara í storminum.

Í Runavík var takið á Lynfrost um at skræða seg leyst. Rútarnir í eini arbeiðshøll í Saltangará fóru eisini í storminum.

Ymiskir aðrir smærri skaðar vóru eisini, men mest í Gøtu, sigur løgreglan í Runavík, ið eisini fekk fráboðan um tvey smærri ferðsluóhapp í vikuskiftinum.

Tað sigst, at ættin var sera ring í Gøtu leygardagin.

**Ikki so ringt í Havn**

Løgreglan í Havn hevur ikki fingið fráboðan um skaðar aðrastaðni í landinum.

Í Havn var støðan ikki líka ring, sum í Eysturoynni. Mest var talan um smáskaðar. Ein bátur sleit í bátahylinum á Argjum og í Miðbýnum fór onkur rútur.

Uppi á Sandvíkarhjalla reiv tekjan á stóra bygninginum hjá Skipasmiðjuni. Eitt pappírzvirki er nærhendis og har fóru hurðar á bilhúsunum, sigur løgreglan í Havn.



*Sera nógvur vindur var leygardagin. Tekjan reiv á bygninginum hjá Skipasmiðjuni á Sandvíkarhjalla í Havn*

**Mynd Álvur Haraldsen**



**Myndir: Jens Kristian Vang**

# Fyrstu tvíburðarnir í 2000

*Fyrstu tvíburðarnir í 2000 eru suðuroyingar*

Dagfinn Olsen

Hóast nógv hevur verið prátað um lágu burðartølini í Suðuroynni, so eiga suðuroyingar met, tá tað ræður um at koma fyrst. Fyrsti føroyingur í 2000 kom í heimin á Tvøroyar Sjúkrahúsi klokkan 04:20 tann 1. januar.

Og fyrstu tvíburðar í árinum 2000 eru eisini suðuroyingar.

Tann 28. januar fingu Suni og Katrin West úr Øravíkarlíð tvíburðar á Landssjúkrahúsinum. Tvær genturur. Tann fyrra kom í heimin klokkan 16:30 og tann seinna klokkan 16:50. Hin fyrra vigaði 2545 gramm og seinna 2005 gramm. Báðar vóru 48 centimetrar langar.

Tær eru føddar 3 vikur ov tíðliga, men hava tað gott og taka uppá.

Stóribeiggin, 4 ára gamli Áron, er errin og vil fegin sleppa at nana.

Suni West sigur, at tá alt er komið í rætta legu, sleppa tey vónandi heim. Hann vónar, at hetta verður innan einar 14 dagar.

Hann heldur, at tað má vera av tilvild, at suðuroyingar eiga fyrsta føroying og nú eisini fyrstu tvíburðar í øldini.

Sosialurin ynskir tillukku og blíðan byr.

# Annika sang William









**Myndir: Jens Kristian Vang**

Dagfinn Olsen

Sunnudagin hevði Annika Hoydal konsert í Norðurlandahúsinum. Á skránni vóru løg, sum hon hevur sett til yrkingar hjá William Heinesen. Hesi eru komin á fløgu, sum er komin út í samband við 100 ára dag Wiliam Heinesens.

Á fløguni leika góðir danskir tónleikarar. John von Daler hevur lagt tónleikin tilrættis.

Á konsertini leiktu nakrir av fremstu føroysku tónleikarunum.

Donsku tónleikararnir hava úr at gera langa tíð framyvir, og tí hevur John von Daler lagt tónleikin til rættis fyri 3 tónleikarar.

Saman við Anniku Hoydal á pallinum í Norðurlandahúsinum vóru Rógvi á Rógvu, trummur, Magnus Johannesen, tangentar og Edvard Nyholm Debess, bass.



# SEV fríðkar um økið

*Meira enn ein millión krónur verða nýttar til at gera økið uttan um høvuðsskrivstovuna virðiligt*

Um einar tveir mánaðir verður arbeiðið at fríðka um øki uttanfyri høvuðsskrivstovuna hjá SEV liðugt.

Síðani bygningurin við Landavegin varð bygdur seint í 80'unum hevur øki uttan um ligið hálvliðugt.

SEV keypti bygningin frá Grannskoðaravirkinum, sum nú gongur undir navninum Inpact.

Felagið við tí nógva streyminum heldur, at øki nú skal gerast meira virðiligt.

Síðani í heyst hevur verið arbeitt við at fríðka um. Eitt steinsett tún skal gerast. Bilar skulu kunna koyra til høvuðsdyrnar, síðani runt um eitt lítið vatn og útaftur.

Ein á, sum rennur gjøgnum øki, er partur av ætlanini, og onkur trævøkstur skal eisini skjóta seg upp.

Og sum ein staðfesting av, at talan er um SEV og ikki annað felag, verður eitt gamalt – og ístandsett – turbinuhjól sett upp á økinum.

Arbeiðið fer at kosta yvir eina millión. Fuglø Arkitektar í Klaksvík hava lagt arbeiðið, sum Guttesen og Staksberg gera, til rættis.

**ek**



*Túnið framman fyri SEV-bygningin við Landavegin í Havn verður nú fríðkað*

**Mynd: Jens Kristian Vang**

# Útselt til Creamy

Millum 1800 og 1900 atgongumerki eru seld til konsertina hjá poppbólkinum Creamy í Runavík.

Og nú eru fleiri atgongumerki ikki at fáa.

Hálvføroyski bólkurin, sum syngur danskar barnasangir, hevur góðan byr í Føroyum.

Fløgan hjá teimum hevur verið millum tær mest seldu seinasta hálva árið, og í útvarpinum hevur nógv verið at hoyrt til sangirnar á fløguni.

Nú vísir sølan av atgongumerkjum eisini, at føroysku børnini hava tikið undir við lívliga danska barnapoppinum, sum hevur selt eini 200.000 eintøk í Danmark.

Ítróttarhøllin í Runavík tekur 2000 fólk, men fyrireikararnir – Kappróðrarfelagið NSÍ – hava valt at steðga søluni, nú millum 1800 og 1900 atgongumerki eru seld.

Konsertin, sum verður leygardagin 12. februar, er tann einasta á skránni. Ætlanin var eisini at hava eina konsert í Havn, men hendan varð strikað.

Nú verður aftur tosað um at hava hesa konsertina, men partarnir samráðast í løtuni um, hvat tað skal hava við sær av meirútreiðslum.

Um ein semja kann gerast um treytirnar fyri eini eykakonsert, verður hendan helst í ítróttarhøllini á Hálsi sunnudagin 13. februar.

**ek**





# Tveir afturvaldir

*Friðarligur aðalfunur hjá Havnar Arbeiðsmannafelag leygardagin*

Tveir nevndarlimir stóðu fyri valið, tá Havnar Arbeiðsmannafelag hevði aðalfund leygardagin.

Bæði Hans Joensen og Jan Midjord vóru afturvaldir, og teir sita framhaldandi í nevnd saman við Karl Johansen, sum er formaður, Róland Næss Joensen og Eyðbirni Jacobsen.

Á aðalfundinum kunnaði nevndin um eina ætlan at broyta áramálstíðina, so tað framyvir ikki verður so skjótt at vinna sær rætt til fulla pensión.

# Sløkkiliðið fær ákoyringar

*Lokalblaðið hjá norðoyingum heldur, at sløkkilið í Klaksvík skal útbyggjast, um tað skal røkja uppgávur allastaðni, har landsfast er*

Í síðstu viku vóru boð eftir sløkkiliðnum í Klaksvík tvær ferðir sama dag. Og hesi útkallini eru grundarlag fyri atfinningum í Norðlýsinum, sum kom fríggjadagin.

Í lokalblaðnum hjá norðoyingum finnist ein lesari at tí, sum hann nevnir skilaleysa koyring í sambandi við fyrra eldin. Tá skuldi sløkkilið á bedingina, har eldur var umborð á Pison.

Í eini aðrari grein í Norðlýsinum fríggjadagin ivast blaðið í, um tað er ráðiligt, at sløkkiliðið í Klaksvík skal røkja uppgávurnar norðanfyri tunnlarnar.

Kemur eldur í í Klaksvík, meðan sløkkiliðið er á Viðareiði, so kann verulig vanlukka spyrjast burtur úr, heldur blaðið.

Seinna útkallið í síðstu viku var til Norðdepil, har eldur var í einum húsum, og hetta hevur fingið Norðlýsið at seta spurning við trygdina, tá sløkkilið skal sløkkja eld allastaðni, har landfast er.

– Um sløkkiliðið í Klaksvík skal røkja bygdirnar, har landfast er, má sløkkiliðið útbyggjast meira, heldur blaðið.


